


*Poul Jóhan Dahl, við nýggju RAV-sporiútgerðini hjá P/F Wenzel, og Anthonius Dalsgaard, verkførari*

P/F Wenzel:

# Ford-verksmiðjan setur krøv

**Ford-verksmiðjan setur stór krøv til sínar forhandlarar í dag. Tænastustøðið skal vera høgt, og bilverkstøðini skulu hava nýggjastu og mest framkomnu útgerðina. Hjá P/F Wenzel hava teir nú fingið nýggja framkomna sporiútgerð**

BILVERKSTAÐUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bilverkstaðurin hjá P/F Wenzel hevur fingið nýggja útgerð til 4-hjóls útmáting av bilum. Talan er um sporitól av italska merkinum RAV við infrareyðum 8-sensors CCD tøkni til útmáting millum øll fýra hjólini og einum databanka við 9.500 ymiskum bilmodellum.

Umframt 4-hjólsút-mátingber til at máta skeivleikar í akslum og í chassisrammuni. RAV-sporitólið hevur automatiskt spoilaraprogram og er einkult og brúkaravinarligt.

Anthonius Dalsgaard, verkførari hjá P/F Wenzel, sigur, at tað er eitt krav frá Ford, at teir hava slík framkomin útmátingartól.

Í samband við nýggju útgerðina hava bilsmiðirnir fingið serundirvísing frá Eiriki Simonsen, lærara á bildeildini á Tekniska Skúlanum. Hann hevur givið teimum eina holla grundundirvísing í hvat ið ein 4-hjólsútmáting í veruleikanum er, og hvat sporing snýr seg um.

Anthonius heldur, at tað er ein góð íløga at spora bilin einaferð um árið. Kostnaðurin er 625,- krónur, ið er umleið helvtin av hvat eitt dekk kostar at keypa. Við tað at bilurin er rætt sporaður, halda dekkini munandi longri.

# Ragnvald Joensen kom í finaluna

**Ein av bilsmiðjunum hjá P/F Wenzel, Ragnvald Joensen, var millum 10 teir bestu og kom í finaluna í Autoteam-kappingini hjá Ford, ið gekk fyri seg hjá Ford Motor Co. í Keypmannahavn**

BILVERKSTAÐUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*




*Ragnvald Joensen var millum 10 teir bestu og kom í finaluna í Autoteam-kappingini hjá Ford*

Autoteam er eitt blað, sum kemur út 4 ferðir um árið og verður sent til allar Ford forhandlarar í Evropa. Blaðið verður sent persónliga til bilsmiðir, plátusmiðir, verkførarar, kundamóttøku og starvsfólk á eykalutagoymslum.

Endamálið við Autoteam er, at starvsfólkini sjálvi læra at brúka t.d. tekniskar bøkur og vegleiðingar, hetta fyri at tey skulu læra at arbeiða sjálvstøðugt. Tey hava møguleika at lesa seg til fakliga og tekniska vitan um Ford-produktið og dagføra seg við øllum tí nýggjasta, sum er komið á marknaðin.

Við Autoteam blaðnum fylgir eitt spurnarblað, har tey skulu svara ymsum spurningum. Fyri at kunna svara spurningunum mugu tey hava lisið tað, sum stendur í Autoteam bløðum og eisini við at leita í øðrum Ford tilfari.

Við at svara spurnarbløðunum og senda tey inn, luttaka starvsfólkini samstundis í Autoteam kappingini, har tey sum klára seg best vinna eina ferð til Ford Motor Co. í Keypmannahavn.

## Passat best umtóktur



VW Passat er best umtókti tænastubilur í Týsklandi, framman fyri Audi A4 og VW Golf Variant. Mest nýtti motorurin er 1,9 TDI við 130 hk

*Kelda: Motor Magasinet*

## X5 nógv stolin



BMW hava betrað lásini og tjóvarískipanini í X5, sum er ein av mest stolnu bilum í Suður- og Miðevropa. Í royndum og veru blívur 30. hvør BMW X5 stolin

*Kelda: Motor Magasinet*

## Suzuki vann í JWRC



Í Spanien vann Suzuki sítt fyrsta heimsmeistaraskap í Junior World Rally Championship (JWRC), við at vinna fimm út av sjey fyrstaplássum. Vinnarin var sviin Per-Gunnars Andersson í einum Suzuki Ignis

*Kelda: Motor Magasinet*